Tórshavnar musikkskúli

VEGLEIÐING · SPEEDADMIN LEGACY

Kom í gongd

Fyri næmingar og foreldur í Tórshavnar Musikkskúla.

1 Tak appina niður

Finn SpeedAdmin í App Store ella Google Play. Vit brúka SpeedAdmin Legacy, ikki SpeedAdmin Play!.

iPhone / iPad: App Store · Android: Google Play

2 Vel skúla

Opna appina og vel Tórshavnar Musikkskúli.



Vel Tórshavnar Musikkskúla

3 Rita inn

Brúka títt egna brúkaranavn og loyniorð. Foreldur og næmingar skulu brúka sína egnu innriting.

Gloymt loyniorðið?
Vel hjálpina við gloymdum loyniorði á innritingarsíðuni. Hevur tú ikki fingið atgongd, set teg í samband við skrivstovuna.

Tú kanst eisini brúka SpeedAdmin í einum kaga á fotorshavn.speedadmin.dk.

Tórshavnar musikkskúli

VEGLEIÐING · SPEEDADMIN LEGACY

Finn tímatalvuna

Hav yvirlit yvir undirvísingina og upplýsingarnar um tímarnar.

1 Opna Tímatalvu

Her sært tú undirvísing, tiltøk og frítíðaryvirlit.

2 Vel tann rætta tíman

Trýst á undirvísingina í tímatalvuni fyri at síggja tíð, høli og upplýsingar um frálæruna.

Tímatalva



Upplýsingar um tíman

Tórshavnar musikkskúli

VEGLEIÐING · SPEEDADMIN LEGACY

Frálæra og samband

Finn tað, tú skalt venja, og hav samband við læraran.

Frálærupallur

Far inn á tíman í tímatalvuni og vel Frálærupallur. Her kanst tú síggja venjingar og heimaarbeiði og kjatta við læraran, tá lærarin brúkar pallin.

Mínar kontaktir

Her finnur tú kontaktupplýsingar hjá lærarum tínum. Trýst á læraran fyri at síggja teir samskiftismøguleikar, sum eru tøkir.



Hevur tú tørv á hjálp?

Set teg í samband við skrivstovuna:
musikkskulin@torshavn.fo · Telefon 30 24 70

Teksturin er dagførdur í oktober 2026. Skíggjamyndirnar eru úr eldru vegleiðingini og kunnu víkja frá appini í dag. Øll persónsnøvn í skíggjamyndunum eru fiktiv dømi.